Jeanette Ellefsen Blaasvær

Fra: Atli Suni Leo
Sendt: 20. oktober 2020 11:47
Til: Jeanette Ellefsen Blaasvær
Cc: Kirstin Hansen; Fíggjarmálaráðið; Bjarni Askham Bjarnason; Eli Christiansen; Atli Eiriksson
Emne: Hoyringssvar til uppskot at broyta løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir
Vedhæftede filer: 20201013 Útreiðslur býttar yvir ár (5410).pdf

Til Almannamálaráðið

Hey jeanette

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Í hjálagda skjali frá Landsverki er kostnaðarmetingin nú sett greiðari og einklari upp. Enntá verður hildið, at tað ikki er neyðugt at leggja 15% óvissu á innbúgvsmetingina, sum avmarkar óvissuna bert at snúgva seg um HVÚ, meir- og minniveiting, eykaarbeiði og prísvøkstur.

Mælt verður til, at ásettu útreiðslurnar í verklagslógini eru heimildin frameftir at gera avtalur, og ikki fyri longu avhildnar útreiðslur. Tær skulu sjálvandi upplýsast í viðmerkingunum, sum mettur samlaður kostnaður av verkætlanini (áleið 46 mió. kr).

Tað vil siga, at longu hildnar útreiðslur til fyrireiking, projektering, burturtøka av bygningum og verkætlanarleiðslu fram til verklagslógina, ikki skulu takast við í lógartekstin.

Heimildin í lógartekstinum verður sostatt áleið 46 mió. kr. drigið frá áleið 4 mió. kr = áleið 42 mió. kr. hjá landsstýrismanninum at gera avtalur fyri.

Tað eigur at verða umhugsað, at tá HVÚ (Heildarverkætlanarútreiðslur) ella partar av HVÚ verða bjóðað út, at kunnað verður um metta kostnaðin, so tað verður greitt fyri øllum, at parturin til HVÚ er 28,3 mió. kr. + 15% (sí hjálagda skjal), og ikki áleið 42 mió. kr.

Vh Atli

Fra: Jeanette Ellefsen Blaasvær
Sendt: 7. oktober 2020 12:36
Til: megd <megd@megd.fo>; 'javni@javni.fo' <javni@javni.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Cc: Kirstin Hansen <KiHa@lv.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>
Emne: Uppskot at broyta løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir til hoyringar

Góðu tit

Viðheft uppskot at broyta løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir verður sent tykkum til hoyringar. Av tí at málið hevur skund verður biðið um skjótt svar, helst fyrst í komandi viku.

Vinaliga/Sincerely

Jeanette Ellefsen Blaasvær
Fulltrúi/Head of Section

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304000 • Mobile +298 734056
jeb@amr.fo • www.amr.fo